

*Theodor Eli Olsen Dam, sóknarprestur í Kvívík*
Mynd: Jens Kristian Vang

og korini eru ymisk. Eksistentielt eru vit kortini øll komin inn í hendan heim við lívi og deyða, men eru tó øll fevnd av kærleika og umsorgan frá Várharra.

**Er Bíblian ein bók við nógvum týdningarmiklum sannleikum?**
Ja! Hetta er sjálvandi ein trúarspurningur, og um tú ikki trýrt uppá, at Bíblian er ein bók við nógvum sannleikum, so heldur tú kanska ikki tað. Sjálvur haldi eg, at har stendur nógv skilagott í, sum kann lesast bæði bókstaviliga og í fluttum týdningi. Til dømis munnu boðini um at elska og virða hvørt annað vera grundarlagið undir okkara mentan og samfelag.

**Hvat er tað besta við kristindóminum?**
At Guð valdi at gerast ein av okkara!

**Hví fekk Jesus so stóra ávirkan?**
Fyri tað fyrsta segði hann seg vera Guðs son. Fyri tað næsta segði hann eisini, at vit skulu elska hvørt annað. Og tað er ikki so býtt sagt!

**Er Søren Kierkegaard størsti heimspekingurin í nýggjari tíð?**
Nei, tað er hann ikki. Tað veldst eisini um, hvat tú meinar við nýggjari tíð. Heimspekin er sum ein laðaður garður, har teir ovastu steinarnir ikki fáa ligið, um teir niðastu ikki vóru har, tvs. at flestu filosoffar byggja á arbeiðið hjá teimum, ið gingu undan. Gamli filososilærarin hjá mær vildi tó vera við, at tað bara funnust fýra filosoffar, sum kundu kallast originalir, og teir vóru Platon, Aristoteles, Kant og Hegel. Hetta er sjálvandi fýrakantað sagt, men um heimspekin er ein laðaður garður, so er Kierkegaard eitt sera týdningarmikið klípi, ið stuðlar og heldur allari modernaðari hugsan uppi, ið spyr, hvat eitt menniskja er, og hvat okkara tilvera ber í sær.

**Hvaðani fært tú tín íblástur sum prestur burtursæð frá Bíbliuni?**
Eg royni at hava allar antennur opnar og lesa nógv og fylgja við í samfelagsviðurskiftum sum heild. Seks ára gamla dóttir mín hevur onkuntíð flent at mær, tá eg havi nevnt Gajolpakkar í mínum prædikum. Men tað ræður um at finna gullkornini, har tey eru.

**Eru Føroyar eitt tolsamt land?**
Tað veldst um, hvørji evni vit tosa um. Eg haldi ikki, at Føroyar eru so ringar, sum vit ofta gera tær til, men her er lætt at koma til orðanna, og tí hoyrist eisini nógv til meiningar hjá víðgongdum minnilutum.

**Er friðurin í Kvívík betri enn larmurin í stórbýum?**
Í Kvívík er gott at vera, og Kvívík liggur bara 20 minuttir frá Havnini og hálvan tíma frá flogvøllinum. So tað er ikki so langur vegur til stórbýirnar.

**Hvat er eitt eydnuríkt lív?**
Hatta er ein sera gamal spurningur, helst líka gamal sum menniskjan sjálv. Sjálvt Aristoteles, gamli, baksaðist við hatta problemið fyri 2500 árum síðani. Á grikskum verður eydnan kallað *eudaimonia* og er í ætt við orðið *demon*. Eydnan er sostatt ikki ein ónd, men góð demon, sum kortini skal temjast. "Eydnan sveimar einsamøll við strendur, frætt er frá," syngur Kári P., og "Eydnan er ei at líta á," yrkir Mikkjal á Ryggi í einum sálmi. Eg haldi tó, at eitt boð upp á eitt svar kann finnast í einum svari, sum sangarin Kim Larsen gav, tá hann varð spurdur, um hann var eydnuríkur. Svarið hjá honum var: "Eg eri nøgdur!"